# Nógv vitjandi á Planet.fo

Planet.fo slóg sítt egna met fyri vitjandi í farnu viku, við 14.425 brúkarum sambært vevmátingarlistanum hjá Gallup og liggur í farnu viku á tryggum øðrum plássi.

Nýggjur vevmátingarlistið hjá Gallup verður almannakunngjørdur hvørja viku, og hesa vikuna eru fleiri síðir, ið sláa egin met. Millum aðrar planet.fo, sum vanliga kappast við sportal.fo og nummar.fo um annað pláss á listanum aftan fyri portal.fo. Hesa vikuna er talið á vitjani á planet.fo farið upp við 33,2%. Eisini talið á vitjanum 32.445 og á sýndum síðum 106.019 eru munandi hægri enn vikuna fyri.

Men planet.fo er sambært gallup.fo ikki einasta heimasíða, ið tekur egið met eisini bio. fo við 1.068 brúkarum, televarp.fo við 1.003 brúkarum, vinnuvitan.fo við 662 brúkarum, trade.fo við 376 brúkarum sláa egið met.



# Nøkur børn eru dottin niður ímillum



*Nøkur kunnu altíð detta niður ímillum, men tað týdningarmesta er, at vit hava sett okkum fyri at loysa trupulleikan, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum*

**Jógvan á Lakjuni ásannar, at tað var óheppið, at børn við serligum tørvi duttu niðurfyri**

BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er altíð óheppið, at nøkur børn eru dottin niðurímillum. Men síkt kann altíð henda.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, er harmur um støðuna, sum nøkur børn við serligum tørvi og foreldur teirra, eru komin í seinastu mánaðirnar.

Sum tað stóð í Sosialinum um vikuskiftið og sum tað stendur aðrastaðni í blaðnum í dag, eru tað foreldur at børnum við serligum tørvi, sum eru so kroyst at tey spyrja um tey bara skulu flyta av landinum fyri at fáa nøktandi hjálp, tí føroyska samfelagið hevur ongi tilboð til teirra.

Stóri trupulleikin er tann, at dagstovnurin á Trøðni, sum tók sær av hesum børnum er niðurlagdur, uttan at annað, hóskandi tilboð, er komið ístaðin.

Spurningurin er, hví dagstovnurin á Trøðni varð niðurlagdur, áðrenn eitt annað, hóskandi tilboð var klárt at seta í staðin?

– Tað er sjálvandi ein góður spurningur, tí her kom eitt tómrúm í og tað er sjálvsagt ikki nøktandi, tí vit skulu sjálvandi hava tilboð til hesi børnini.

Áttu tit ikki at havt tryggja tykkum, at eitt nøktandi tilboð var klárt at lofta teimum, áðrenn tit tóku tað frá teimum, sum tey høvdu?

– Jú, vit kunnu altíð siga, at vit áttu at havt eina loysn klára. Men hetta snýr seg ikki um so nógv børn, at tað skuldi borið til at finna eina loysn. Og vit hava sett okkum fyri at loysa málið og tað ivist eg ikki í, verður gjørt. Spurningurin er eisini, hvør hevur ábyrgdina av hesum børnum og hjá mær er ongin ivi um, at tað hevur Almanna- og heilsumálaráðið, sigur Jógvan á Lakjuni.

– Men fólk kunnu altíð detta niður ímillum, men tað týdningarmesta er, at vit í felag hava sett okkum fyri at finna eina loysn og tað verðu nú gjørt, sigur Jógvan á Lakjuni, sum annars ikki hevur so nógvar viðmerkingar til málið.

# Vónar at lítli Benjamin

**- Tað er ósømiligt, at vit ikki fáa hjálpt lítlum børnum sum Benjamin betri, tí soleiðis kunnu vit ikki fara við okkara borgarum. Men vit eru greið yvir trupulleikan og hava sett okkum fyri at loysa hann. Men tað fer at ganga ein tíð, sigur Hans Pauli Strøm**



*– Stóri trupulleikin er, at dagstovnurin á Skúlanum á Trøðni varð niðurlagdur, áðrenn eitt annað tilboð varð klárt at lofta børnunum og tað er ikki nóg gott, sigur*

BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er ósømiligt, tí soleiðis kunnu vit ikki fara við okkara borgarum.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum er ógvuliga harmur um ta støðu, sum foreldur lítla Benjamin eru komin í.

Men hann sigur at hjálpin er á veg. Men hann sigur eisini, at tað verður ikki heilt enn, at tað ber til at hava eitt nøktandi tilboð til børn sum Benjamin.

– Tað er ikki ómøguligt at vit einaferð næsta ár kunnu hava eitt nøktandi tilboð til hesi børnini.

Men akkurát nær tað verður, kann hann ikki lova.

– Tað, sum er mest umráðandi er, at vit hava viðurkent trupulleikan og hava sett eitt miðvíst arbeiðið ígongd at loysa málið, sigur hann.

Foreldur Benjamin gera í Sosialinum um vikuskiftið púra greitt, at tá ið tað snýr seg um tað dýrabarasta, tey eiga, vilja tey ikki góðtaka neyðsemjur og tey vilja ikki góðtaka tað næstbestu loysnina. Tí spyrja tey rætt

# Ørkymlandi at børnini ikk

**– Hetta er ein trupulleiki sum kann loysast heilt skjótt, tí tað er óneyðugt hjá Hans Paula Strøm og Jógvani á Lakjuni at uppfinna tann djúpa tallerkin einaferð afturat, sigur dagligi leiðarin í Javna**

BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ógvuliga ørkymlandi, at børn við serligum tørvi ikki kunnu fáa ta hjálp og tann stimbur, tey hava fyri neyðini fyri at mennast so nógv sum gjørligt.

Men tað átti ikki at tikið langa tíð at givið teimum eitt nøktandi tilboð.

Tað heldur Annlis Bjarkhamar, dagligur leiðari í Javna.

Hon sigur, at Javni hevur kikaran á hesum trupulleikanum, at nøkur børn við serligum tørvi ikki hava nøktandi menningartilboð.

Javni hevur eisini roynt at ávirka myndugleikarnar, har vit kunnu fyri at fáa eina loysn.

– Vit halda, at hesi børnini sjálvandi skulu hava eitt dagstovnartilboð, sum øll onnur børn í landinum. Men tað, sum krevst í hesum føri, er, at stovnurin hevur serligan, fakligan førleika til at menna hesi børnini og tí hava vit mælt til, at ein stovnur verður gjørdur til tey.

Annlis Bjarkhamar heldur, at tað átti ikki at tikið langa tíð at skipa ein slíkan stovn og tí heldur hon ógvuliga lítið um, at ætlanin nú er at seta eina nevnd at kanna, hvussu eitt tilboð til hesi børnini skal snikkast saman.

– Tað ber ikki til! Málið er einfalt, tí loysnin liggur beint fyri framman og eg dugi ikki at síggja, hvør trupulleikin skal vera. Tað einasta, sum krevst, er, at Hans Pauli Strøm og Jógvan á Lakjuni semjast um, hvør av teimum báðum skal hava ábyrgdina, tí alt tað praktiska má vera at finna útav.

– Hesi børnini kunnu ikki bíða eftir eini nevnd, leggur hon afturat.

**Skulu ikki uppfinna nakað nýtt**

Annlis Bjarkhamar sigur, at vit skulu ikki uppfinna ein nýggjan stovn.

– Vit hava havt smábarna-